# Vinnan gevur C-vitamnir

**John Johannessen**
*valevni fyri Javnaðarflokkin í Suðurstreymi*
*www.jokarin.com*



Eitt sterkt vinnulív hevur c-vitaminir við sær til vælferðina.

Javnaðarflokkurin vil, sum altíð, varðveita vælferðina fyri allar føroyingar. Vit skulu vera í fremstu røð innan heilsuviðurskifti og skúlaskap.

Fyri, at hetta skal eydnast, krevst eitt framtakshugað vinnulív. Eitt vinnulív, sum er ført fyri og áhugað í at ganga nýggjar leiðir.

**Vit stríddu okkum fram**
Tá vit vóru í djúpu kreppuni fyri tíggju árum síðani, vóru allir partar á einum máli um, at vit ikki aftur skuldu koma í eina slíka støðu. Vit vildu hava fleiri bein at standa á. Vit vildu styrkja útflutningsvinnuna við øðrum vinnum afturat fiskivinnuni.

Ungdómurin legðist ikki á boðini. Tit hava sanniliga verið framtakshugað og virkisfús. Tit hava arbeitt, lært og útbúgvið tykkum til hesa stóru ábyrgd. Ábyrgdina at gera tykkum sjálv før fyri at bera landið fram í eina nýggja framtíð.

**Eingin vildi hálpa**
Men hvat hevur samgongan tey seinastu seks árini gjørt, fyri at tit nú sleppa at nýta tykkara evni at framleiða dygdarvørur til kravmikla útheimin? Teir hava onki gjørt! Ella, sum Tórbjørn Jacobsen segði í sjónvarpssendingini úr Eysturoy hóskvøldið: "Tað hevur ongin vinnupolitikkur verið her á landi í áravís".

Hetta var vorðið sum ummæli av síni egnu samgongu. Men sum Heini plagar at siga. Hetta er veruleikin!

**Vit lurta eftir tykkum**
Øll tit. Tit, sum hava búgvið tykkum út og brynjað tykkum til at menna Føroyum aðrar vinnuvegir. Tit vita, at tað finnast gongdar leiðir framá.

Vit hava nevnt møguleikan at geva føroyskum tónleikarum møguleikar at koma út í heim við síni framleiðslu.

Sjálvandi vilja vit eisini skapa møguleikar fyri, at tit, sum hava og fara at útbúgva tykkum, fáa møguleika at vinna okkum fremmandan kapital til landið.

Tað átti at verið latin ein ígongdsetarastuðul til fólk, sum vilja framleiða forrit til dataheimin, til arkitektar, sum kundu hugsað sær at teknað til útlendskar byggikappingar og so framvegis. Her átti ein ígongdsetara stuðul at verið latin til fólk.

**Granskingardepil**
Tað hevði verið náttúrligt at latið øll tey væl lærdu fólkini í Føroyum verið við til at gjørt Føroyar til ein depil fyri bæði vinnuligari og aðrari vísindaligari gransking. Vit hava eitt land, sum er so lítið, at tað er væl egnað til at royna skipanir, sum seinni kunnu nýtast aðrastaðni.

Tað er jú ikki tykkum at siga, at vit longu hava eina fjøld av fólki, sum kann menna føroyska framleiðslu og harvið lyfta okkum inn í eitt trygt vælferðarsamfelag.

**Lyfta í felag**
Vit í Javnaðarflokkinum vita, at saman við tykkum er hetta gjørligt. Vit vita øll, at lata vit hetta mistreystið og eljustríðið hjá farnu samgongu vera fortíð og í felag líta framá við góðum treysti. So ber nógv til.

Lat okkum líta framá. Nú skal vend koma í. Eftir seks ára langan vetur, skal koma vár.

Tað lýsir fyri framman. Eg skal ikki lova tykkum, at appelsinir fara at vaksa á trøunum í summar. Men saman eru vit før fyri at byggja húsið. Føroyar fyri øll.

Gott val!

# Kreppa

**Álvur Kirke**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Vit liva mitt í stórari hugburðskreppu.

**At mála svart**
Fyri umleið einum mánaða síðani varð skrivað um, at vit vóru á veg inn í eina kreppu.

Tekinið var, at eitt sindur færri bilar vóru seldir í ár enn í fjørð.

Fólk tosa og skriva um kreppu, sum um vit kunnu vænta hungur og hall.

Tíðindafólk og svartskygdir politikarar hava nokk at gera við at greiða fólki frá at kreppan kemur.

Men, tey sum hava skil fyri slíkum siga, at búskapurin er sterkur, og at tað skal nógv til, áðrenn vit kunnu tosa um kreppu.

Eg sá eisini herfyri grein frá einum sokallaðum seriøsum politikara, sum skrivaði um at taka upp, og at tað fór at vera eitt øgiligt upptak eftir sitandi samgongu.

So svart ber til at mála støðuna!

**Hugburðskreppa**
Nei, tað er eingin búskaparkreppa, men vit hava eina hugburðs- og hugsjónarkreppu.

Hugburðurin millum vanliga fólkið er tann, at:

Eg skal hava.

Tit kunnu gjarna spara, bara tað ikki verður tikið frá mær.

Fara vit ein túr í býin í Havn, ber illa til at koyra fyri streyminum av nýggjum bilum.

Fara vit ein túr inn í ein handli, t.d. SMS, er illa framkomandi fyri fólki, sum keypa luksusvørur.

Har sæst eingin kreppa!

**Fullveldi**
Men, tá tað kemur til at vinna okkum tjóðarfrælsi, tá hava vit ikki ráð.

Samgongan 1998 setti sær høg mál, men tá danir harkaðu, bakkaði samgongan.

Teir tordu ikki at halda lovaðu fólkaatkvøðuna, tí teir væntaðu at meiriluti ikki fekst fyri fullveldi.

Helst høvdu teir rætt!

**At nassa uppá danir**
Stórur partur av fólkinum hugsar sum so:

Missa vit peningin, sum vit fáa frá Danmark, so fái EG minni til mítt luksuslív.

Eg fái ikki ráð at skifta bilin 3. hvørt ár. o.s.fr.

Tað eru fá, sum hava fatað, at blokkurin ikki er ein gáva frá Danmark, men ein partur av tí vinningi, Danmark hevur av at hava Føroyar í "ríkisfelagsskapinum".

**Leiðari við hugsjónum**
Fólkinum tørvar ein leiðari við hugsjónum!

Onkur skal ganga undan.

Tá vit hoyra politikararnar, er greitt, at har eru fáar hugsjónir, og fá hugsjónarfólk.

Hóast Miðflokkurin er lítil, hevur hann ein leiðara við hugsjónum, sum kunnu lyfta tjóðina upp.

Tí er tað heilt náttúrligt, at Miðflokkurin fer at eiga løgmann eftir valið.

Tað hevði verið eitt gott val.

Ein slíkur leiðari kann leiða tjóðina burtur út hugsjónarloysinum og -kreppuni.

# Loysing ella samband

**Edva Jacobsen**
*valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Høðusevnið til hetta løgtingsvalið eru viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Spurningurin, sum er settur, er, um vit skulu fara úr ríkisfelagsskapinum, ella um vit skulu finna eian skipan innanfyri verandi karmar.

Valið hesaferð er sera einfalt. Sambandsflokkurin er einasti flokkur sum hevur melda púra greitt út av vit ynskja at varðveita viðurskiftini við Danmark og hevur einki ímóti at dagføra hesi viðurskifti.

Tjóðveldisflokkurin harafturímóti ynskir loysing og at at kvetta her og nú. Teir hava funnið eitt orð, sum eitur fullveldi, og aðrir hava latið seg tøla av hesum, men rætta orðið er loysing og loysing í óðum verki.

Sambandsflokkurin ásannar, at samlaða ríkisveitingin, blokkstuðul og annað er uml. 840 milll. Um henda upphæddin skal burtur, so mugu loysingarflokkarnir svara okkum, hvar peningurin skal koma frá. Men teir hava einki svar, tí har er einki svar.

Fullveldissamgongan hevur minka blokkin við uml. 366 mill. Kundi hesin peningur ikki verið nýttur til at gjørt gott við á tí sosiala økinum so sum:

- Byggja røktar og ellis.- og røktarheim.
- Byggja sambýli.
- Byggja íbúðir hóskandi til eldri.
- Framhaldandi menning og útbygging av heimarøktini.

Men soleiðis skuldi tað ikki vera.

Vit í Sambandsflokkinum hava sum hjaratamál at varðveita vælferðarsamfelagið, og tí er tað óðamannaverk at skerja blokkstuðulin, soleiðis sum fullveldissamgongan hevur gjørt.

Vel tað trygga, vel vælferðina, vel Sambandsflokkin.

# Arbeiðsloysisskipanin

**Hjalmar Jóhan Juul**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



Arbeiðsloysisskipanin er vorðin ein skipan, sum virkar eftir mínum tykkji ógvuliga væl, fyri fólk innan flakavinnuna, men hvat er tað sum gerð hesi fólk til naka heilt serligt, at tey kunna verða tryggjaði løn, er hetta ikki ein rættur sum øll føroya fólk skullu kunna nýta fult út, eg tosaði við handverkara, han fortaldi mær, at han tordi ikki at seta ein nýggjan mann í starv, tí han visti ikki um han kláraði at bjóða honum eitt starv, sum skuldi verða 40 týmar um vikuna, men hevði han kunna kunna sett ein mann í starv, við líknandi treytum sum innan flakavinnuna, hevði ein stórur trupuleiki verði loystur. Hesin trupuleiki var ikki bara fyri han, hesin trupuleiki er eisini hjá fiski monnum, tildømis tá í skipi skal klassast, umvælias ella tá ið fiskaloysi er, tá mugu hesir menn ganga og onga inntøku fáa, tað kann verða longri ella stytri týð, men eina loysn hava teir, teir kunna siga upp og ikki fara við sama skipi í eitt ár ÓRÍMULIGT, nei lat okkum gera eina skipan, sum gevur okkara fólki her á landi somu vilkorð, týð vit gjalda øll inn til hesa skipan, og skulla øll tí hava sama ratt til hesa skipan.

Minnist til D-dagin tann 20. januar

Tá kemur Sjálvstýrisflokkurin sterkur inn á ting við tínari hjálp

Gott sjálvstýrisval



# Rækjuflotin

**Edvin Joensen**
*valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy*



Eitt av eyðkennunum hjá undanfarnu samgongu er vantandi stýring.

Eitt dømi um hetta er kreppan í rækjuvinnuni. Rækjuflotin hevur farnu árini ført hópin av peningi til landið, og menn hava gjørt stórar íløgur í hesa vinnu. Hesi skip hava vunnið sær rættindi í fremmandum sjóøki, rættindi, sum eru mist tann dag henda vinna heldur uppat, og rættindi, sum vit einki hava goldið fyri. Hesir menn hava víst stórt hegni til at laga seg til nýggjar og broyttar umstøður, og hóast hesin floti hevur havt nøkur rakár, so vita vit ikki enn, um honum kundi verið lív lagað, um vit høvdu styrkt honum kappingarførið eina tíð.

Undanfarna samgonga hevur ført ein, eg vil kalla betongdogmatiskan politikk, sum minnir okkum á Rusland í farnum tíðum. Stuðul skal ikki latast, punktum. Men hvat við at stýra? Teir vóru jú settir til at stýra landinum.

Eg ivist ikki í, at um rækjuflotin hevði fingið somu sømdir í Føroyum, sum Mærsk fær í Danmark, so hevði tað verið ein stórur bati. Allar manningar hjá Mærsk sigla undir DIS skipanini, og spara harvið reiðarínum stórar upphæddir. Eg dugi ikki at síggja, at hvørki Mærsk ella Danmark eru verri farin av tí. Aðrir hættir tað almenna kundi brúkt, til at lætta hesum flota um útreiðslur hansara, hava eisini verið nevndir.

Í staðin hendir tað sama sum fyri 10-15 árum síðani. Tey nýggjastu og mest framkomnu skipini fara fyrst, og hóra nøkur undan, verða tað tey elstu og vánaligastu skipini, ið ikki kunnu kappast við onnur.

# Besta Boðið er Miðflokkurin

**Absalon Absalonsen**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



**Kristna lívsáskoðanin ella humanisma.**
Í Miðflokkinum er full semja um, at kristna lívsáskoðanin skal avspeglast í okkara lógarverki, harvið skal ikki verða sagt, at ikki kristin fólk eru í hinum flokkunum, men Miðflokkurin hevur hetta sum fremsta mál, og má sigast at vera einasti flokkur har alls eingin ivi ella ósemja er um hetta.

Sostatt er als eingin ivi um hvar Miðflokkurin stendur í spurninginum um t.d. fríða fosturtøku ella viðvíkjandi spurninginum um, hvørt tveir persónar av sama kyni skulu fáa líknandi rættindi sum maður og kona. Tað kemur ikki undirritaða við, hvat onnur gera ella hvussu tey liva, men um lógir landsins verða soleiðis, at tær beinleiðis elva til fremjan av tí, ið Guds orð staðiliga ávarar ímóti, tá verður av sonnum grund til at siga, grát mítt elskaða land. Tak til dømis hesi brotini úr Nýggja Testamenti úr 1. kap. í Rómbrævinum. Hóvast tey kendu Gud ærdu tey hann ikki..... Tí gav Gud tey upp í hjartans lystir teirra til óreinsku, til at vanæra likam síni hvørt við øðrum..... til vanærandi lystir: Tey.... ærdu og dýrkaðu skapningin fram um skaparan...... kvinnur teirra skiftu hin náttúrliga umgangin um við tann, ið er ímóti náttúruni, somuleiðis hildu mennirnir uppat við hinum náttúrliga umganginum við kvinnuna og brendu í lystum sínum hvør eftir øðrum- og fingu á sær sjálvum lønina fyru villu sína.-

Ikki so sjáldan síggja vit at flokkar vilja grunda sín politik á humanismu, og síðani verður ført fram, at hetta fellur væl í tráð við kristindómin, tí Jesus hevur jú sagt, tú skalt elska næsta tín sum teg sjálvan. Jesus var spurdur, hvat er hitt største boðið, og svaraði. Tú skalt elska Harran Gud tín av øllum hjarta tínum, av allari sál tíni og av øllum huga tínum. Hetta er hitt stóra og fyrsta boðið. Men annað er hesum líkt. Tú skalt elska næsta tín sum teg sjálvan. Á hesum báðum boðum hvíla øll lógin og profetarnir.

Legg til merkis at hetta seinna dámar humanistunum væl at endurgeva. Tað, sum Jesus nevnir fyrst og leggur størstan dent á, verður snildisliga tagt burtur, skapningurin verður settur fram um Skaparan. Hesum ávarðar Guds orð eisini ímóti (jfr. t.d. Skriftbrotið omanfyri)

**Sjómannafrádráttur**
Í Miðflokkinum er eingin ivi um at sjómannafrádrátturin eigur at verða varðveittur, tað tykist, sum hetta er ilt hjá mongum heimafólkum at skilja. Øll eru samd um, at fiskiríkidømi okkara er ogn Føroya fólks. Men vit mugu minnast til, at hetta ríkidømi okkara svimur ikki sjálvt upp á land, vit fáa ikki hendur á tí, um ikki onkur er til reiðar at ofra stóran part av sínum privatlívi. Hvat høvdu t.d. skrivstovufólk sagt, um tey noyddist inn á skrivstovuna 1. januar, síðani verða dyrnar læstar, og tey noyðast at verða á arbeiðsplássinum til 1. apríl, arbeiða hart arbeiði í minsta lagi 12 tímar um samdøgri allar sjey dagarnar í vikuni, telefonstuðulin røkkur til eina stutta samtalu um vikuna, ringir tú meir enn tað, skalt tú sjálvur gjalda í dýrar dómar. Høgtíðir heima, merkisdagar í familjuni stevnir, jarðarferðir og mangt annað, heimafólki kann fara til, mást tú vera fyri uttan, innilæst á skrivstovuni. Men um tey nú fingu 15% skattalætta, hevði tú so gótikið alt hetta ???

Er svarið ja, so fá tær læknaváttan, keyp oljubuksir og aðra útgerð og far til skips.

**Samferðsla og økismenning**
Fast samband, har tað er gjørligt, er rætta loysnin, men hetta krevur skilagóða tilrættalegging og gott samanhald. P/f Vágatunnilin royndist ein skilagóð loysn, men hví verður nýtt partafelag sett á stovn til at byggja og reka Norðoyatunnilin, vit áttu at lagt hesi bæði feløg saman í eitt felag og lati tað fingi til uppgávu at bora, riki og fíggja undirsjóartunlar um alt landi. Her ræður um at vísa samanhald, Vit kunnu hóskandi nýta SEV sum fyridømi, navnið merkir Streymoy, Eysturoy og Vágar, men allar Føroyar komu uppí og el-útbyggingin varð framd um alt landið, og øll fáa streym fyri sama gjald, tað hevði verið ógjørligt uttan samanhald. Vit kunnu uttan iva útbyggja okkara fastsamband eftir sama leisti, til koyrandi verður Úr Svínoy til Gásadals og úr Sumba til Viðareiðis.

Um ikki partar av landinum skulu gerast eftirbátar mugu vit seta okkum hetta sum mál.

**Familju og sosialmál**
Familju heilsu og sosialmál hava verið og eru framvegis hjartamál miðfloksins. At tryggja vælferð og rættindi hins einstaka frá gitan til grøv. Mong foreldur stúra fyri eykaútreiðslunum, ið standast av at bera børn í heim, tað hevði ikki verið meir enn rímuligt, um landið heilsaði hvørjum nýføðingi vælkomnum við eini vøggugávu uppá 10 000 kr. Umleið 800 nýggjir borgarar síggja dagsins ljós í Føroyum um árið, tað hevði verið ein árlig útreiðsla fyri landið uppá 8 mill. kr. og hon átti at komi fram um mangt annað á fíggjarlógini.

Ein gloymdur bólkur av borgarum eru tey sum í hesum árum náa pensiónsaldur og onga pensión hava uttan fólkapensión, hava hesi ein hjúnafelaga, sum hevur inntøku, fáa tey bert grund-upphæddina (4 000 kr um mánaðin). Hesi sum hava goldið skatt síðan tey vóru 14 ár hava uppiborið betri viðferð, hava verið skattgjaldarar í meir enn 50 ár. Er hjúnafelagin t.d. 10 ár yngri, mugu tey bíða, til tey eru 77 ár eftir at fáa fullan ágóða av fólkapensiónini. Hevur nakar hoyrt um ein akademikara, sum fær niðursetta pensión tí hjúnafelagin hevur inntøku, hóvast nógvir akademikarar eru ikki skatgjaldarar meir enn umleið 30 ár.

**Vinnulív og útbúgving**
Okkara náttúrugivna fiskiríkidømi og alimøguleikar, ið vit eru signaði við frá Skaparans hond, eiga vit at fara væl um og hava í huga, at eisini komandi ættarlið skulu kunna gagnnýta somu møguleikar. Fiskidagaskipanin hevur roynst stak væl sum stýrisamboð og eigur tí at verða varðveitt, vónandi hava vit skjótt nóg góðar royndir, ið kunnu nýtast til at seta í verk eina hóskandi stýring innan alivinnuna soleiðis, at vit í mest møguligan mun sleppa undan sjúkum og trupuleikum, ið standast av ovurtrýsti á aliøkini.

Vinnuútbúgvingar á sjógvi og landi eiga vit at raðfesta ovarliga, tað hevur víst seg í meir enn einari kreppu, at gott var at eiga góðar kreftir í landinum, ikki minst fólk, sum ikki fýra fyri at fara uttanlands at forvinna pening til landið, tað vóru slík, íð løgdu lunnar undir endurnýggjan av fiskiskipaflotanum í 50 unum, og tað vóru í stóran mun slík, íð avmarkaðu kreppuna í 90 unum.

Vilja tit fólki og landi væl, so farið mannsterk og velji Miðflokkin 20. Januar.

Gud signi Føroyar mítt land.

# Sjálvbjargnar og frælsar Føroyar

**Haldur Vang**
*Valevni Fólkafloksins í Eysturoy*

20. januar komandi skulu vit so aftur einaferð til valborðið, at velja umboð á Føroya løgting.

Fólkaflokkurin bjóðar seg fram við góðum treysti, og ivast ikki í fólksins undirtøku, so hann framvegis kann mynda landsins stjørn, sum hann virðiliga hevur prógvað, at hann er fult førur fyri.

Fólkaflokkurin vil framvegis miðvíst arbeiða fram móti einum sjálvbjargnum og frælsum Føroyum.

Einum fríum og frælsum Føroyum, í góðari samvinnu við okkara norðurlendsku grannar. og heimin annars.

Fólkaflokkurin vil virka fyri at Føroyar framvegis vera eitt gott og virðiligt land at liva í, hjá øllum landsins borgarum.

Viðvíkjandi vinnuni er aðalhugsjón fólkafloksins, at vinnan skal klára seg sjálv, uttan almennan stuðul, við at geva vinnuni so góð kor, so hetta kann lata seg gera

Eg eri kortini av teirri áskoðan, at vit eiga at tora at veita vinnuni kreppuhjálp í avmarkaða tíð, um so skal vera, og harvið varveita virðismikil vinnutól, ið annars gleppa okkum av hondum, til óbótaligan skaða fyri land okkara framyvir. Tí uttan vinnutól onga vinnu, og onga vælferð.

MVG lógin er nú so innanholað, at hon er ein ein rein junglulóg, at umsita hjá arbeiðsgevarum, her er alneyðugt við broytingum. Fólkaflokkurin vil arbeiða fyri at MVG lógin verður broytt, so hon verður einklari og betri at umsita, og um møguligt at lækka MVGið. Vit hava sum kunnugt hægsta mvg í øllum Europa, helst í øllum heiminum.

Sum eitt av valevnum fólkafloksins vil eg heita á teg góði veljari, at vera við til at seta ein sterkan fólkaflokk á ting, við at fara á val og seta kross við lista A, fólkaflokkin, ella við eitt av valevnum floksins.

Til seinast fari eg at ynskja Føroya fólki eit gott val, og Harrans signing yvir land og fólk.